# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tey veruligu og týðandi málini verða ikki umrødd, og tað hevur sett okkara framtíð í vanda*

*(Michael Bloomberg).*

# Enn ein føðingardag í húsavarðhaldi

**Í gjár fylti Aung San Su Kyi 62, og sum so mangan áður helt hon føðingardag í húsavarðhaldi.**

Í gjár fylti burmesiski andstøðuleiðarin Aung San Su Kyi 62 ár. Av teimum seinastu seytjan árunum hevur hon sitið ellivu ár og 238 dagar í húsavarðhaldi, so hesa ferð helt hon enn ein føðingardag í varðhaldi.

Men tað merkti ikki, at onnur høvdu gloymt hana og dagin. Tvørturímóti varð skipað fyri stórum mótmælistiltøkum víða um heimin, har fólk í túsundatali mótmæltu húsavarðhaldinum og kravdu, at Aung verður latin leys alt fyri eitt.

-Tað er undrunarvert, at ein so lítil kvinna skal hava so stóra megi í sær, men tað er týðiligt, at hon man vera ein vandamikil kvinna, eftir sum tað ringasta einaræðið í Asia ikki torir at lata hana sleppa úr húsavarðhaldinum. Hetta sigur eitt sindur um, hvussu stóra megi tað hevur, at ein er lógliga valdur, sigur norski politikarin Børge Brende, sum er formaður í altjóða politikarafelagsskapinum PD Burma.

PD Burma leggur støðugt trýst á hernaðarstýrið í Burma fyri at fáa tað at lata Aung San Su Kyi leysa. Herumframt hava 59 fyrrverandi forsætisráðharrar og forsetar skrivað undir eina áheitan á stýrið um at lata hana leysa. Millum teir 59 eru eitt nú Bill Clinton, George W. Bush eldri og Jimmy Carter.

Flokkurin hjá Aung San Su Kyi vann stórsigur á tjóðartingsvalinum í Burma í 1990, men hon og flokkurin fingu ongantíð valdið, tí herurin legði uppí. Sambært Amnesty International eru umleið 1.200 politiskir fangar í Burma, og teirra millum eru nakrir av teimum, sum vórðu valdir á valinum í 1990.




*Í fleiri londum kravdu fólk í gjár, at Aung San Su Kyi verður latin leys. Hendan myndin er úr Indonesia*

# Krevja endurgjald

**Í Vietnam-krígnum sprændu amerikanararnir eiturevni út yvir skógirnar, men tað fekk óhugnaligar avleiðingar seinni**

Amerikanski herurin og flogvápnið sprændu meiri enn 60 milliónir litrar av eiturevninum Agent Orange út yvir skógirnar í Vietnam í sekstiárunum. Endamálið var, at evnið skuldi fáa bløðini at detta av trøunum, so amerikanararnir skuldu hava lættari við at finna fíggindan, sum fjaldi seg í skógunum.

Tað vísti seg tó, at eiturevnið fekk aðra ávirkan eisini. Eina sera óhugnaliga ávirkan, tí síðani kríggið eru meiri enn tríggjar milliónir fólk fødd í Vietnam við brekum av alskyns slagi, og tað er staðfest, at talan er um genetiskan skaða av Agent Orange.

Í gjár byrjaði eitt rættarmál í USA, har nakrir vietnamesar krevja at fáa endurgjald fyri tann skaða, sum teir hava fingið av Agent Orange. Vietnamesararnir hava fyrr roynt at fáa endurgjald, men tá málið kom fyri rættin, vísti dómarin tí burtur, tí eftir hansara tykki var tað ikki nóg væl prógvað, at tað var Agent Orange, sum var orsøk til skaðan hjá saksøkjarunum.

Tað er ta avgerðina, sakstøkjararnir vilja hava rættin at ógilda.



*Tríggjar milliónir vietnamesar fingu varandi mein av amerikanska eiturevninum*

## STUTT SAGT

### So er hann óheftur

Borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, hevur havt eina heldur óstøðuga politiska kós. Fyrst var hann limur í demokratiska flokkinum, men misnøgd gjørdi, at hann fór úr flokkinum og upp í republikanska flokkin. Men nú er tað heldur ikki nóg gott longur, so í gjár kunngjørdi hann, at hann er farin úr republikanska flokkinum og er nú óheftur. Eygleiðarar í New York halda, at Michael Bloomberg hevur gjørt av at stilla upp til amerikanska forsetavalið næsta ár sum óheft valevni. Hann sigst eiga næstan 30 mia. krónur, so tað verður eingin trupulleiki at fíggja valstríðið.

### Oljudálking hóttir

Myndugleikarnir í Grikkalandi bera ótta fyri, at olja frá tí strandaða skipinum „Sea Diamond“ kann dálka tær væl umtóktu strendurnar á oynni Santorini. „Sea Diamond“ fór á eitt riv tætt við oynna tann 6. apríl og sakk, men sambært myndugleikunum eru framvegis 200 tons av olju í vrakinum. Kanningar hava víst, at vrakið liggur soleiðis, at ein lítil jarðskjálvti kann fáa tað at søkka longri niður í dýpið, og serfrøðingar siga, at so kann hol koma á tangan við oljuni.

### Oljan rindar vindin

Fíggjarnevndin hjá amerikanska Senatinum hevur samtykt eitt lógaruppskot, sum áleggur oljufeløgunum, sum virka í USA, at rinda tilsamans 160 mia. krónur í eyka skatti og avgjøldum. Nevndin sigur, at pengarnir skulu brúkast til at byggja amerikonsku vindorkuna út. Um nakrar dagar skal uppskotið til atkvøðugreiðslu í sjálvum Senatinum, men tað er longu nú greitt, at tað verður samtykt har, skrivar AP úr Washington.